Seamus Heaney:

# Skaldskapur er ein sam

**Á Listastevnuni fáa føroyingar høvi at hoyra Nobelvirðislønta yrkjaran Seamus Heaney lesa upp egnar yrkingar til pípuleikin hjá Liam O' Flynn. Nobelvirðislønina í bókmentum fekk norðurírska skaldið fyri eitt ritverk av lyriskum vakurleika og etiskari dýpd, ið hevjar gerandisundrini og livandi fortíðina, sum dómsnevndin tók til**

PORTRETT
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

*Millum peikifingur og tummul*
*Hvílur klossuti pennurin*
*Honum fari eg at grava við*
*"Digging", 1966*

Longu við yrkingini "Digging", tann fyrsta í hansara fyrsta yrkingasavni, markaði Seamus Heaney sítt øki. Hann gravaði niður í sítt minni og fann fyrst pápa sín og longur niðri abba sín og síðani allan sín norðurírska mentanararv. At "Digging" í dag stendur sum ein varði yvir alt ritverkið hjá Heaney mundi koma av lokalu røddini, ið endurreisti fortíðina og tosaði alheimssøk teirra tigandi og kúgaðu tvørturum øldir og mentanir. Kortini tók tað drúgva tíð, áðrenn Heaney av álvara fekk rist norðurírsku krøvini um politiska støðutakan av sær og við Nobelvirðislønini í 1995 umsíður varð virðismettur fyri sína skaldsligu og estetisku hugsjón.



*Seamus Heaney*

## Mýriyrkingarnar

Við røðini av teimum sokallaðu Bog-Poems (Mýriyrkingarnar) fekk grevsturin hjá Heaney í fortíðini mytiskar og allegoriskar týdningar. Íblásturin til mýriyrkingarnar fekk Heaney eftir at hava lisið eina frágreiðing um meir enn tvey túsund ára gomlu líkini, sum vórðu funnin í mýrilendi ymsa staðni í Danmark, og hvussu tey vórðu avrættað eftir barbariskum ritualum. Eitt av hesum óvanliga væl varveiddu líkum var Grauballemaðurin. Hesin gjørdist eisini ímyndin í eini av kendastu yrkingunum hjá Heaney, "The Grauballe Man", sum Alexandur Kristinasen hegnisliga hevur týtt til føroyskt.

Yrkingin blæsur nýtt lív í uppgrivnað líkið í okkara hugaheimi í tveimum stigum. Fyrst, heldur øvut, við at petta tað sundur og halda eina ávísa frástøðu. Meðan eyguni kanna líkið, umskapast tað til ein dunga av lívleysum lutum, skøvningurin til 'mýrivið', hælurin til 'eitt basalt egg', hárið verður 'ein motta' o.s.fr. Men spakuliga

## Grauballemaðurin

Eins og var hann júst heltur úr
sum tjøra, liggur hann
á einum kodda av torvi
og tykist at gráta um

sín egna døkka hyl.
Æðrarnar í skøvningum hansara
eru sum mýriviður
kúputi hælur hansara

sum eitt basaltegg.
Ristin er skorpnað
og køld sum ein svanafótur
ella ein myrirót.

Mjadnar hansara sum bak
og pungur á kræklingi,
ryggurin ein állur fangaður
í glitrandi evju.

Høvdið hevjað
høkan ein hjálmgluggi
brettur upp av kruvda barka
hansara

garvaður og herdur.
Lekta sárið
opnast inneftir
í vínberjaskýming.

Hvør sigur "lík"
um livandi sjón hansara?
Hvør sigur "kroppur"
um tøttu hvíld hansara?

Og rustaða hárið
so ótrúlig ein motta
sum á fostri.
Fyrst sá eg skelkjandi andlit hansara

á eini ljósmynd,
høvur og øksl
upp úr mónum, skammfílað
sum nýføðingur tikin við tong,

men nú liggur hann
fullkomin í minni mínum
heilt út í reyðu
naglirnar,

á vágskálunum
í vakurleika og grimd:
sum hin doyggjandi Gallarin
ið alt ov gjølla hóvar

saman við skildri sínum,
við veruligu tyngdini
av hvørjum einstøkum offri
sorað og søkt.

*Týðing eftir Alexandur Kristiansen*